ítróttur

Nr. 201 • fríggjadagur • 21. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Skála vil gera sítt

Sjálvur er Skála-liðformaðurin leikbannaður til seinasta umfarið. Men hann slær fast, at tað fyrst og fremst ræður um hjá Skála at vinna sín dyst. Og so mugu teir bara síggja, hvussu leikur fer í Havn

Á Skála verður eisini nógv tosað um FM-møguleikan. Men liðformaðurin heldur, at hetta tosið mest er millum áskoðararnar, meðan spælararnir royna at taka uppgávuna sum vant

SKÁLA
Jákup Mørk

Hóast tað mesta av prátinum um fótboltin leygardagin higartil hevur snarað um HB og B36, so eru tað ikki bara hesi bæði, sum hava møguleika til gullið.

Tí við einum javnleiki millum havnarfeløgini bæði, so kann Skála væl standa við gullinum. Og skal roknast sum sannlíkindarokning, so gevur hetta orangu-litta eysturoyarliðnum 1/3-møguleika.

Hóvar spælarunum væl

Tí er einki løgið í, at Skála eisini ger nógv við sínar fyrireikingar undan seinasta dystinum, og sum so tykist tað hóva spælarunum væl, at teir tykjast vera eitt sindur uttan fyri fokus.

- Tað er kanska ikki so løgið, at so er. Okkara møguleiki er jú tengdur at øðrum úrslitum, meðan HB og B36 kunnu avgera sítt sjálvi. Tað er so sjávlandi ikki tann besta støðan, men hinvegin hóskar tað okkum væl, at fokus er aðrastaðni, sigur liðformaðurin hjá Skála, Pauli G. Hansen.

Spurdur, um fótbóltstosið á vestara armi á Skálafjørðinum hevur verið øgiligt hesa seinastu tíðina, tykist Pauli hava hug at flenna.

- Tað hevur verið øgiligt í alt ár, og tað er sjálvandi ikki minni nú. Tað eru longu fleiri vikur síðani, at fólk fóru at tosa um møguleikan fyri, at seinasta umfarið kundi laga seg soleiðis, at vit vórðu meistarar, um dysturin í Gundadali endaði javnur. Og hesi hava so eisini fingið rætt nú. So prátið hevur verið øgiligt.

Venjarin ger sítt

Hóast nógva prátið kring vøllin, so hava bæði spælarar og venjari roynt at fyrireika seg sum vant. Men Pauli ásannar kortini, at tað hevur verið nakað av óróg v.

- Serliga týskvøldið vóru nógv fólk og hugdu at venjingini, og tað eru vit ikki so vanir við. Men hinvegin, so hevur venjarin (Jóhan Nielsen, blðm.) duga avbera væl at dempa spælararnar. Hann hevur jú verið í líknandi støðum óteljandi ferðum, og tí veit hann akkurát, hvat krevst.

Men eitt er venjing. Annað er dysturin, sum skal spælast leygardagin. Væntar tú, at Skála uttan víðari klárar at spæla sítt spæl, ella fara tit at hava annað oyra at kalla uttan fyri vøllin, so tit kunnu hoyra, hvussu leikur fer í Havn?

- Sjálvur fari eg so at hava bæði oyruni uttanfyri. Eg eri nevnliga leikbannaður, so eg ætli mær at fylgja væl við, hvat gongur fyri seg í Gundadali, flennir Pauli, áðrenn hann aftur gerst meira álvarsamur.

- Men sjálvandi kann tað ávirka. Kanska serliga, um tað verður at kalla tøgn millum okkara áskoðarar. Tá fara spælararnir ivaleyst at hugsa, hvat tað er, sum gongur fyri seg. Men tað mugu vit so royna at tackla.

Vilja enda væl

Tá vit at enda tosa um sannlíkindini fyri, at Skála kann standa við gullinum, tá avtornar, tykist Pauli ikki vera heilt vónleysur um møguleikan.

- Tað er jú altíð ein møguleiki fyri javnleiki í Gundadali, og so mugu vit taka av. Eg rokni í øllum førum við, at talan verður um ein sera varnan fyrra hálvleik, har hvørki B36 ella HB vilja vága nakað. Men heldur ein javnleikur sær hampuliga leingi, so verða partarnir noyddir at satsa, og so verður tað álopsfótbóltur fyri allar pengarnar.

Og álopsfótbóltur er væl eisini tað einasta, sum tit kunnu brúka til nakað?

- Ja. Skulu vit hava heiðursmerki, so skulu vit vinna dystin. Gera vit tað, so fáa vit í minsta lagi silvur.

Og eru tit nøgdir við tað?

- Bæði og. Sjálvandi kanst tú altíð hyggja í bakspegli og iðra teg um einstakar dystir. Men hugsar tú hinvegin, hvussu meint vit hava verið raktir av skaðum, so haldi eg slettis ikki, at tað er so galið. Og treytað av, at vit vinna dystin leygardagin, so verður talan undir øllum umstøðum um besta úrslitið í søguni hjá felagnum. Og tí vilja vit í øllum førum røkka, slær Pauli fast at enda.

Seinasta freistin nærkast

Leygardagin er evstamark fyri tilmeldan til stóru fótbóltsgallaveitsluna

GALLAVEITSLA
tíðindaskriv

Veitslan, sum í ár verður hildin í Leirvík, verður skipað sum ein afturlatin veitsla fyri 1. deild hjá monnum og kvinnum, dómarum, nevndum í feløgunum og nevnd og starvsfólki hjá FSF .

Á veitsluni verða kosnir ársins spælarar, ársins stjørnuskot, ársins málmaður og ársins venjari hjá bæði kvinnum og monnum, og sum nakað nýtt verður eisini farið undir at kjósa árs ins dómara.

Kostnaðurin fyri tiltakið er kr. 350 fyri hvønn. Íroknað prísin er vælkomstdrykkur, borðhald við forrætti, høvuðsrætti og dessert og kaffi og 2 øl/sodavatn til hvønn. Undir borðhaldinum verður eisini felagssangur og gott undirhald við Magna Poulsen.

Aftaná borðhaldið spæla Showmenn til dans. Dansurin er bert fyri gallaveitslu luttakarunum.

Tilmelding á teldupost galla@gigotu.fo ella við sms á tlf. 585051/223667.

Kostnaðurin á kr. 350 skal verða goldin á konto í Føroya Sparikassa 273.329.5 áðrenn leygardagin 22. oktober.

Upphiting til endabrakið í Glitni

Áðrenn endabrakið í Formula kappingini leygardagin kl. 15, verður sum vænt upphiting í Glitni, men nú talan er um endabrak millum bæði havnarliðini, verður gjørt eitt sindur eykað burturúr.

Glitnir lata dyrnar upp kl. 13.00. tá verður turr grind, spik og epli á skránni saman við úrvalinum barrvørðurin annars hevur at bjóða. Kl. 14.30 stendur bussurin klárur uttanfyri og koyrir væl upphitaðu áskoðararnar, tað verið seg HB'arar, B36'arar ella uttanveltaði ókeypis niðan í Gundadal.

nud